# *Billigfly* ella ikki

**Hvassorðað orðaskifti hevur tikið seg upp í norskum bløðum, eftir at ein fakfelagsformaðurin hjá oljuarbeiðsmonnum ákærdi oljufeløgini fyri at ganga uppá kompromis við trygdini, tá tey nýta ”billigfly”, sum hann segði.**

FLOGVANLUKKA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í norska blaðnum VG var í gjár ein samrøða við fakfelagsformannin í limafelagnum Safe, Terje Nustad. Hann segði, at flogfarið hjá Atlantic er ógnað til ferðafólkaflutning, og at oljuvinnan ikki raðfestir trygdina nóg høgt, tá tey velja bílig flogfør, sum eru rakt av nógvum óhappum. Eisini vildi hann vera við, at norskir oljuarbeiðarar óttast fyri, at fleiri álvarsligar vanlukkur verða, og at teir krevja, at oljufeløgini gevast at nýta ”billigfly”, sum hann tekur til.

### Ger sær dælt

Í blaðnum í dag tekur høvuðsálitismaðurin í Aker Kværner, Atle Teigland, málið upp og hann ákærir, Terje Nustad, fyri at gera sær dælt av flogvanlukkuni.

- Um Nystad hevur havt illgruna um at trygdin ikki var í lagi, so kundi hann komið við teimum fyrr, tað hevði verið meira virðiligt. Men í hesum førinum ger hann sær bara dælt av støðuni og melur sína egnu køku, sigur Teigland, sum vísir á, at tey hava sera fáar limir hjá fakfelagnum Safe.

Sambært Teigland hevur ongantíð verið talan um veruligan ótta fyri trygdini millum starvsfólkini hjá Aker Kværner.

- Vit vita, at nógv fólk eru bangin fyri at flúgva. Og vit flúgva av og á undir vánaligum umstøðum, sigur Teigland.

### Hava álit

Til spurningin um kreppufundin, sum var á Orminum Langamánadagin, sigur Teiglend, at evnið á fundinum var ikki flogtrygdin sum so, men at prátað varð um ymiskt í samband við flogtænastuna. Og hann sigur víðari, at álitisfólkini hjá Aker Kværner høvdu noktað fyri at starvsfólkini skuldu flúgva, um illgruni var um trygdina hjá Atlantic.

- Vit álitisfólk, stjórar og verkætlanarleiðarar nýta øll flogfarið, og tað sigur somikið sum, at vit hava álit á trygdini, sigur hann við VG.



## Kanna um eitrandi gass kom inn í stýrihúsið

**Flogskiparin varð í gjárkvøldið avhoyrdur fyri aðru ferð**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Umboð fyri norsku skaðanevndina vóru aftur í gjárkvøldið á sjúkrahúsinum á Stord og tosaðu við flogskiparan á vanlukkuflogfarinum. Hetta er aðru ferð, at hann er avhoyrdur.

Birger Andreas Bull hjá skaðanevndini sigur við Bergens Tidende, at frágreiðingin hjá tí 34 ára gamla flogskiparanum kann vera heilt avgerandi fyri at fáa staðfest, hvat hendi, tá flogfarið hjá Atlantsflogi fór útav.

Birger Andreas Bull upplýsir eisini, at sjúkrahúsini hava tikið blóðroyndir av øllum, sum vóru í flogfarinum. Blóðið skal nú kannast fyri at fáa staðfest, um eitrandi gass frá motorunum lak inn í stýrihúsið. Tað hevur verið frammi fyrr, at flogskiparar á flogførum av hesum slagnum hava kært seg um svimbul.

Ferðskrivarin og upptøkutólið í flogfarinum hava fingið skaða undir vanlukkuni, men upptøkutólið er sent til USA fyri at vita, hvat kann fáast burtur úr tí. Ferðskrivarin skrásetir upplýsingar um, hvussu høgt uppi flogfarið flýgur, hvar tað er statt, hvørja kós tað hevur, og hvussu skjótt tað flýgur. Upptøkutólið skrásetir alt samskiftið millum flogskiphararnar og millum flogfarið og eftirlitstornið.

# British Aerospace 146-200 líka trygt sum onnur flogfør

**Tað er líka trygt at flúgva við einum flogfari frá British Aerospace sum við øðrum flogførum, sigur kunningarstjóri hjá Statens Luftfartsvælsen, við Sosialin**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*




*Torbjørn Ancker sigur, at øll flogførini hjá Atlantsflogi lúka allar ásettar treytir og hava verið til tær eftirlitskanningar, sum eru álagdar felagnum*

- Flogførini hjá Atlantsflogi eru góðkend av Statens Luftfartsvæsen sambært donskum og altjóða reglum, og tey lúka øll krøv. Flogførini hjá British Aerospace eru líka trygg at flúgva við sum onnur flogfør, sigur Torbjørn Ancker, kunningarstjóri hjá Statens Luftfartsvælsen, við Sosialin.

Torbjørn Ancker vísir á, at trygdarreglurnar í sambandi við flogfør eru sera umfatandi. Tá ein verksmiðja fer undir at byggja eitt flogfar, verður alt tilfarið, stórt sum smátt, kannað út í æsir til tess at fáa staðfest, at hvør einasti lutur lýkur altjóða reglurnar á økinum. Tá flogfarið er liðugt, verður tað kannað og roynt, og harafturat verður tað skoðað. Lýkur tað allar treytir, fær tað skrásetingarnummar. Samstundis verður avgjørt, hvussu ofta flogfarið skal til eftirlit, og at allar umvælingar skulu gerast á góðkendum verkstaði.

Torbjørn Ancker sigur, at øll flogførini hjá Atlantsflogi lúka allar ásettar treytir og hava verið til tær eftirlitskanningar, sum eru álagdar felagnum. Allar umvælingar eru eisini gjørdar á góðkendum verkstaði.

### Hagtøl siga einki

Í sambandi við vanlukkuna fyrr í vikuni hava summir fjølmiðlar víst á, at vanlukkan á Stord er ikki tann fyrsta hjá einum flogfari frá British Aerospace, og at talið á vanlukkum er stórt samanborið við, hvussu mong flogfør av hesum slagnum eru í flúgving.

Torbjørn Ancker sigur, at tað ber ikki til at brúka talið á vanlukkum til at staðfesta, at eitt ávíst slag av flogførum er ótrygt at flúgva við.

- Frá 1962 til 2000 hendi ikki ein einasta vanlukka við teimum kendu Concorde-flogførunum, og tí varð ofta sagt, at Concorde var tað tryggasta flogfarið í heiminum. Men í 2000 datt eitt Concorde-flogfar niður í París, og skuldu vit tá samanborið vanlukkutalið við talið á flogførum av hesum slagnum, gjørdist Concorde brádliga tað ótryggasta flogfarið at flúgva við, men soleiðis kunnu vit sjálvandi ikki gera tað upp, sigur Torbjørn Ancker.

### Umstøðurnar

Tað avgerandi er, hvussu nógv flogførini flúgva, hvussu ofta tey flúgva, og ikki minst hvar tey flúgva, sigur Torbørn Ancker. Kunningarstjórin hjá Statens Luftfartsvæsen ásannar, at vandin fyri óhappum og vanlukkum er sjálvandi størstur, har umstøðurnar eru verri enn aðrastaðni. Eitt nú hevur tað týdning, hvussu langar lendingarbreytirnar eru, og hvussu veðurlíkindini eru.

- Vit kunnu siga, at vandin er lutfalsliga størri í eitt nú Grønlandi, Norðurnoregi og Føroyum, tí har kunnu vindur, vatn og ísur ávirka trygdina, sigur Torbjørn Ancker og vísir í hesum sambandi á, at skandinaviska flogfelagið SAS hevur næstan bara havt óhapp og vanlukkur á innanríkisrutunum í Noregi og Svøríki, har umstøðurnar kunnu líkjast teimum í Norðurnoregi, Føroyum og Grønlandi.

- Her hava British Aerospace-flogførini tann fyrimun, at tey kunnu lenda á stuttum vallum, leggur kunningarstjórin hjá Statens Luftfartsvæsen afturat.